# Fleyr koppaði SÍ

**KVINNUFLOGBÓLTUR** Hóast munurin ikki var tann stóri á pappírinum, tá avtornaði, hevði Fleyr størri yvirskot og vann 3-0 á SÍ, ið við tapinum mátti víkja oddasessin

Hilmar Jan Hansen



*Munurin var ikki stórur, hóast Fleyr vann øll settini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Seinnapartin í gjár vóru tað tvey spent og uppsett kvinnulið, ið fóru á vøllin í Gundadalshøllini, tá Fleyr tók ímóti SÍ. Hesar uppgerðirnar eru ofta endaðar við, at hóast Fleyr kundi spæla væl og hótta eitt sindur, var tað kortini aloftast SÍ, ið fór avstað við øllum.

Men so varð ikki hesa ferð, tí Fleyr megnaði at halda fokus og koyra á allan vegin. At tað so rakk til sigurs á júst SÍ, kann fara at geva Fleyr-kvinnunum eitt alvorligt skump tann rætta vegin, tí seinnu árini er liðið sum oftast fallið av egnum áðum – mest, tí avrikini hava verið alt ov óstøðug.

Í fyrsta setti í gjár løgdu bæði lið bragdliga fyri, og hóast Fleyr streyk avstað við tí, kundi tað eins væl verið SÍ. Men her kom eisini til sjóndar, at hetta veruliga var dagurin hjá Anju Danielsen, tá hon í avgerandi løtuni ímóti endanum smekkaði fleiri bóltar í gólvið, so Fleyr vann settið 27-25.

Fleyr sá út til at skula halda fram í øðrum setti, tí byrjanin gav beinanvegin 5-0. Men at tað kann skifta skjótt, vísti SÍ, tá sørvágskvinnur við sjey bóltum á rað fóru framum 7-5. So bar ikki til meira hjá gestunum, og í staðin var tað Fleyr, ið stýrdi gongdini restina av settinum.

Gongdin í triðja setti var nokk so jøvn, men Fleyr datt ikki í grøvina, sum mong flogbóltslið gera, tá tey eftir tvey vunnin sett taka sær meira av løttum í tí triðja. So eisini her megnaðu havnarkvinnur at leggja trýst á SÍ, ið gjørdi alsamt fleiri feilir og ikki megnaði at sláa ígjøgnum í avgerandi løtunum.

Hvat sigurin hevur at siga fyri Fleyr, mugu komandi dystir vísa, men í øllum førum gav hann beinanvegin eitt annaðpláss, nú bæði Mjølnir, Fleyr og SÍ eru jøvn við 18 stigum. Hinvegin mugu komandi dystir eisini vísa, um SÍ tók sær mein av ósigrinum, ella um liðið reisist skjótt aftur.

Í øllum førum gav hesin dysturin ein góðan forsmakk av, hvat væntast kann av restini av kappingini í Eikliguni hjá kvinnum, ið gott og væl er hálvrunnin. Nógv kann henda enn, men spennandi verður at fylgja fremstu liðunum, ið øll síggja út til at kunna vinna á øllum.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Ternan vildi meira

**KVINNUFLOGBÓLTUR** Í botndystinum í Kollafirði í gjár hevði Ternan munin og vann 3-1 – mest tí toftakvinnur bæði vildu og kundu meira enn KÍF-kvinnurnar

Hilmar Jan Hansen

Sigurin merkti fyri tær í Ternuni, at tær nú eru nummar seks á stigatalvuni – ella sæð úr hinum endanum, eru triðniðastar. Óivað ein støða, uppflytararnir av Toftum eru væl nøgdir við, tí talan er um eitt nýtt felag og fyri ein stóran part spælarar, ið ikki hava royndir frá spæli á hægsta stigi.

Umframt Ternuna og KÍF, ið nú hava fýra stig í part, stríðist eisini Dráttur í botninum, har liðið liggur einsamalt við tveimum stigum, men við einum dysti minni enn hini bæði.

Dysturin í Kollafirði í gjár var ikki ólíkur einum botndysti, men var hinvegin nokk so javnur fyri tað nógva. Gjøgnumgangandi vóru tað tær í Ternuni, ið tóktust meira uppsettar tað mesta av tíðini, hóast KÍF var hampuliga væl við í løtum. Ternan vísti størri vilja, umframt at liðið hevði fleiri streingir at spæla uppá.

Millum annað høvdu fleiri av spælarunum hjá KÍF ikki sín besta dag, tá tað kom til servurnar, og tá tær ikki fingu sítt egna álopsspæl at koyra, bar ikki so væl til at hótta gestirnar nóg nógv. Hinvegin var spælið hjá Ternuni tryggari, og hóast KÍF vann triðja sett, sá tað ikki út til at skaka toftakvinnur nakað serligt, tí tær komu sterkt aftur og vóru sera sannførandi í fjórða og avgerandi settinum.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Mjølnir nýtt oddalið

**KVINNUFLOGBÓLTUR** Við einum tryggum heimasigri á TB, ið ongantíð megnaði at hótta av álvara, spældu kvinnurnar í Mjølnir seg upp á fremsta plássið í Eikliguni

Hilmar Jan Hansen

Gjøgnum alt kappingarárið hava tað verið kvinnurnar úr Sørvági, ið hava átt oddasessin, men nú tær snávaðu á útivølli ímóti Fleyr, gjørdi klaksvíkskvinnur sær dælt av støðuni og løgdu seg á odda í kvinnukappingini, tá Mjølnir vann ein tryggan 3-0 sigur á TB.

Mjølnir hevur alla tíðina ligið beint aftan fyri SÍ og lúrt, og nú tveir av dystunum í hesum umfarinum vóru millum fýra av teimum fremstu liðunum, kann ikki sigast annað, enn at Mjølnir og Fleyr komu best burtur úr tí. Bæði Mjølnir og Fleyr yvirháláðu SÍ, ið ikki hevur líka góðan settmun, men øll trý liðini hava nú 18 stig í part.

Mjølnir hevði hesa ferð TB á vitjan, og undan dystinum kundi roknast við hvørjum sum helst, tí TB hevur ofta ligið eitt sindur aftan fyri hini, men síðani krøkt seg framum í evstu løtu. Soleiðis í fjør, tá TB megnaði at vinna seg í FM-finalurnar heilt ímóti endanum.

Men líka so opin, sum dysturin kundi síggja út frammanundan, gjørdist hann avgjørt ikki. Mjølnir kom kanska ikki í gongd beinanvegin, men so skjótt sum klaksvíkskvinnur høvdu fingið fótin fyri seg, lótu tær lítlan og ongan iva vera um, hvønn veg dysturin fór.

Mjølnir spældi væl, uttan tó at spæla upp til sítt allarbesta, men tað rakk væl og virðiliga til ein sigur, har TB ikki fekk nakað sett og heldur ikki serliga nógv annað. Tvørakvinnur megnaðu ikki av álvara at hótta, tí tað var ikki nóg mikið, at Gudrid Nolsøe gekk undan, tá hinar ikki kláraðu at koma aftaná.

Bæði kantur og miðja riggaðu væl hjá Mjølnir, sum í løtuni ikki sær út, sum er ætlanin at fara úr oddasessinum í bræði. Men kappingin verður hørð, tí einki av liðunum er so avgerandi støðugt, so enn kann kortini nógv henda í kvinnukappingini, har fleiri eru um boðið.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

**KÍF – Ternan** 1-3
(20-25, 21-25, 25-22, 18-25)

**Mjølnir – TB** 3-0
(25-21, 25-20, 25-19)

**Fleyr – SÍ** 3-0
(27-25, 25-22, 25-23)

**Eik-ligan** *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 11 | 9 | 2 | 30 | 8 | 22 | 18 |
| 2 | Fleyr | 11 | 9 | 2 | 29 | 13 | 16 | 18 |
| 3 | SÍ | 11 | 9 | 2 | 27 | 13 | 14 | 18 |
| 4 | TB | 11 | 7 | 4 | 24 | 19 | 5 | 14 |
| 5 | ÍF | 10 | 4 | 6 | 17 | 20 | -3 | 8 |
| 6 | Ternan | 11 | 2 | 9 | 10 | 29 | -19 | 4 |
| 7 | KÍF | 11 | 2 | 9 | 10 | 30 | -20 | 4 |
| 8 | Dráttur | 10 | 1 | 9 | 13 | 28 | -15 | 2 |